# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



16/12-08 fekk Heini eina lítlasystur, hon vigaði 4550g og var 55 cm long. Foreldrini eita Anna Mohr Askham og Hans Jon Askham

**Føðingar**

14. januar fingu Anna Sofía Gaard og Jón í Soylu, Argir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4525 gr.

16. januar fingu Maud Egholm og Jens Christian Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

16. januar fingu Hildur D. Michelsen og Samson Højgaard, Argir, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4650 gr.

17. januar fingu Kristín Baldvinsdóttir og Rókur Tumm-asarson, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3950 gr.

19. januar fingu Jóhanna og Bogi Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3525 gr.

19. januar fingu Beinta og Jens Sørensen, Eiði, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4380 gr.

21. januar fingu Saloma V. Jóhannesen og Rógvi Á Heygum, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

22. januar fingu Margaret L. Kjelnæs og Heri Kjelnæs, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4000 gr.



Tann 17/1-2009 fekk Ró eina lítlasystur. Diddan var 51 cm long og vigaði 3650 gr. Foreldrini hjá hesum fittu prinsessunum eru Karin Dahl og Kenneth Jacobsen

**Brúdleyp**

9. jan. 2009 *giftust* Jessie Hansen og Leif Mortensen, Hoyvík

Í dag, 23/1 kl. 17, giftast í Kollafjarðar kirkju, Hallgrím Hansen og Simona Midjord. Opið hús verður leygardagin frá kl. 15.

**Gullbrúdleyp**

25. januar hava Sólvá og Hans Mortensen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd á degnum.

**30 ár**

Leygardagin 24 jan. 2009 fyllir Beinta Sørensen av Viðareiði, búsitandi á Glyvrum, 30 ár. Dagurin verður hildin á Sjókaféini, Fjøruvegur 3 í Runavík frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**85 ár**

Leygardagin 24. januar verður Torrey Lindberg 85 ár. Tey ið ynskja at heilsa uppá Torrey, eru vælkomin á Sambýlið á Heygnum, millum kl. 17.00 og 20.00.



**Prógv**

Bogi Dam Jacobsen hevur 13. januar 2009 lokið prógv sum »Bachelor of Architecture and Construction Management« á VIA Univercity College í Horsens.

# Torrey Lindberg 85



Leygardagin 24. januar fyllir Torrey Lindberg í Klaksvík 85 ár.

Torrey er ættaður úr Trongisvági, sonur Hansinu og Andreas Lindberg. Torrey vaks upp í stórum systkinaflokki, tí Hansina og Andreas fingu 11 børn, 9 dreingir og 2 gentur.

Eftir lokna skúlagongd fór Torrey at arbeiða hjá einum kolafelag, sum helt til á Drelnesi. Í 1946 fór hann til Danmarkar á handilsskúla, og í 1947 giftist hann Korinthu, f. Iskasen úr Klaksvík. Tey búsettust í Klaksvík, og Torrey fekk starv á skrivstovuni hjá Kjølbro. Fyrst í 60-unum fekk Kjølbro sær heilsølu, og Torrey fór so at arbeiða har. Seinni gjørdist hann leiðari á heilsøluni. Torrey var eisini eitt skifti lærari á handilsskúlanum, sum var kvøldskúli, og hann hevði onkrar roknskapir um hendi.

Korintha og Torrey fingu sonin Kára, sum er giftur við Mariu, f. Olsen í Gøtu.

Í 1977 stovnaði Torrey, saman við soninum, egna heilsølu, Norðoya Fruktsølu. Har arbeiddi Torrey, til hann gavst fyri aldur.

Tey ið ynskja at heilsa uppá Torrey, eru vælkomin á Sambýlið á Heygnum, millum kl. 17 og 20.

*-red*

# Landsstýrið fyri 30 árum síðan



*Landsstýrismenninir, f.v. Heðin M. Klein og Hergeir Nielsen, Tjóðveldisflokkurin, Atli P. Dam og Jákup Lindenskov, Javnaðarflokkurin, Dánjal Pauli Danielsen og Demmus Hentze, Fólkaflokkurin. Atli P. Dam var løgmaður*

Á tingfundi 23. januar 1979 fór val fram av løgmanni, ið síðan útnevndi hinar fimm landsstýrismenninar.

Tað eydnaðist Tjóðveldisflokkinum, Javnaðarflokkin og Fólkaflokkinum at koma ásamt um átrokandi spurningar, sum høvdu staðið í botni undir landsstýrissamráðingunum.

Einasta broyting frá undanfarna landsstýrinum, var at Heðin M. Klein og Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum vóru skiftir út við Petur Reinert og Finnboga Ísakson.

*Kelda: Myndaárbókin árið ið fór 1979*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ian Onghamar** verður kórsettur í kapellinum á Vestre Kirkegård í Keypmannahavn leygardagin kl. 14. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum í Havn seinni.

Jarðarferðin hjá **Rigmor Thomsen í Norðragøtu** verður úr Gøtu Kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Rigmor, kunnu lata Gøtu kirkju eina gávu.

Urnan við **Sannu Nolsøe**, ættað úr Vági, búsitandi í Herlev, fer úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13.

Mikudagin andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi **Erling Beck úr Porkeri**, 74 ára gamal.

**Petrina Jensen**, vanliga nevnd Gigga, úr Kvívík, andaðist í heiminum týsdagin 20 januar, 90 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju leygardagin kl. 13.

**Dagurin**

**23. januar. Emerentius.** Navnið er komið skeivt fyri; tað skal vera Emerentiana, deyð umleið ár 300 (í gomlum álmanakkum Emerent). Hon var vinkona við Agnas (sum varð tikin av døgum umleið ár 300) og var steinað til deyða, tá ið hon fylgdi vinkonuni og harðliga hevði at teimum, sum píndu og drupu hana.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*